tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Ítróttur: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Politikararalønir og vatntætta skottið…

Oddagrein

Í fjør var mikið rumbul um tingmannalønir, tá løgtingsmenn samtyktu at hækka egnu grundlønir sínar úr umleið 16.000 krónum upp í umleið 25.000. Eitt var, at tingmenn gjørdu hetta samstundis, sum landsins myndugleikar sum arbeiðsgevarar royndu at fáa fakfeløg at halda aftur í lønarkrøvum.

Tá varð eisini spurningurin reistur, hvørt tað er rætt, at løgtingsmenn sjálvir skulu kunna áseta egnar lønir - ella ikki.

Uppskot tingformansins um hækkaðu lønirnar varð kortini samtykt - uttan serlig mótmæli. Høvuðsgrundgevingin fyri at hækka lønirnar var, at løgtingsstarvið skuldi virðismetast hægri - at starvið skuldi fáa hægri tign, og at vit harvið skuldu fáa betri tingmenn, sum aftur skuldi føra til dygdarbetri politisk avrik.

Føgur orð, kunnu vit siga. Og vit skulu ikki á hesum stað fara at meta um, hvørt tingmenn liva upp til álitið, teir sjálvir hava veitt sær. Men vit kunnu staðfesta, at tað er púra burturvið, at tingmenn sjálvir skulu áseta egnu lønir sínar. Og eina høvuðsgrundgeving fyri hesum fingu vit nú henda dagin, tá ting- og landsstýrismenn bóru fram, at landsstýrismannalønirnar eisini eru ov lágar! Hetta kom fram í áliti frá nevnd, sum hevur viðgjørt landsstýrismannapensjónirnar.

Eitt er tað, at okkara kosnu menn og kvinnur skulu fáa eina góða løn, og vit kunnu eisini taka undir við teimum, sum siga, at tað ikki skal verða eitt fíggjarligt bakkast fyri einhvønn, at verða valdur á ting ella í landsstýri. Men alt við máta, góðu menn! Tað merkir ikki, at okrast skal við lønunum, tí onkur í privata vinnulívinum fær hægri løn enn løgmaður ella onkur landsstýrismaður. So væl spælir klaverið heldur ikki.

Rættuliga ørkymlandi er tað eisini, at politikarar, ið hava sum hugsjón, at hvør einstakur av landssins borgarum sjálvur skal tryggja sína egnu eftirløn, nú skjýtur upp, at landið skal rinda landsstýrismonnum og løgmanni upp í 26.000 krónur í pensjón restina av lívinum. Hví í allari víðu verð skal løgmaður metast so nógv hægri enn vanligir fólkapensjónistar?

Veruleikin í dag er, at ein tingmaður, sum hevur sitið á tingið í eini 10 ár, og sum kanska hevur eina privata pensjón umframt, fær eina tríggjar arbeiðsmannalønir í pensjón.

Er tað soleiðis, landið skal stýrast?

Politikarar okkara skulu hava góðar arbeiðs-, lønar- og eftirlønarumstøður. Eingin ivi um tað. Men setið óhefta nevnd at áseta hesi viðurskifti, so landsins borgarar sleppa undan at misteinkja politikarar fyri at draga til sín sjálvs. Tá fáa vit eisini tað vatntætta skottið, ið so mangan hoyrist av politikaramunni…

Sosialurin

Viðmerking:

Um upplýsingina frá landsstýrinum: Frá kunning til propagandu

Tórsdagin var síðsti fundur í hesi tingsetuni og tískil síðsta høvi til eitt orðaskifti á tingi við landsstýrið og samguflokkarnar, áðrenn tey nú fara at gera seg liðug við samráðingarnar við donsku stjórnina um tað ætlaða fullveldið — um nú tíðarætlanin hjá teimum fer at halda.

Tað, sum elvdi til eitt bæði drúgt og mangan heitt orðaskifti, var at sama dag gjørdi ein merkilig tilvild, at fyrrapartin fingu vit útborið í hvørt hús ein propagandafaldara frá landsstýrinum um fullveldisætlanina, og seinnapartin skuldi ein kritiskur fyrispurningur um kunningarpolitikkin hjá landsstýrinum í samband við fullveldisætlanina svarast í løgtinginum.

Orðaskiftið gjørdist ein eirindaleysur kritikkur av hesum sokallaða kunningarpolitikkinum hjá landsstýrinum. Tí vit kunnu nú, við hesum propagandafaldaranum sum tað higartil síðsta tiltakið í "kunningini" hjá landsstýrinum, staðfesta, at ístaðin fyri kunning snýr tað seg um eina propagandaherferð, eina totala politiska kampanju av einvísum og einoygdum sjónarmiðum.

Fyri tað fyrsta er tað ikki bara hettar, at sjálvstýrismálið ikki verður lýst frá fleiri síðum. Tað er verri enn so, tí umframt at lýsa síni egnu sjónarmið tekur man nú til eitt nýtt propagandatrick: man uppfinnur nøkur kritikkpunkt, íð verða sett fram sum spurningar. Á henda hátt tekur man so at siga orðið úr munninum á lesarunum: "Jú, men andstøðan sigur ...". Man velur so teir hóskiligastu kritisku spurningarnar burturúr, snarar teimum eitt sindur so teir verða lagaligari at svara uppá — og so vísir man teimum aftur. Tey kritisku sjónarmiðini verða jarðløgd. Ikki eitt verður standandi til lesararnar sjálvar at taka støðu til.

Fyri tað næsta er "kunningarpolitikkurin" í sjálvstýrismálinum ikki kunning men ein propagandaherferð, tí í allari hesi almenni "kunningini" er ein fullkomin yvirvág av sjónarmiðinum hjá tí eina partinum. Eg sigi ikki at tað er lygn, at tað er ósatt, sum verður sagt. Men tá bara sjónarmiðini hjá øðrum partinum hava eitt so fullkomið yvirræði í tí sum verður borið út, tá skiftir kunning til at vera rein og sker propaganda. Hóast hetta er eitt mál, sum býtir flokkarnar og tjóðina í tveir líka stórar partar, sum standa ímóti hvørjumøðrum, so brúkar landsmyndugleikin alt sítt vald at propagandera fyri teirri einu síðini. Tað verður ikki tikið minsta fyrilit fyri, at í veruleikanum er tað ikki nakar meiriluti, heldur bara ein minniluti í fólkinum, sum tekur undir við landsstýrinum í hesum málinum.

Fyri tað triðja hevur kunning sum fyritreyt, at tað er nakað nýtt, sum tú ber fram. Landsstýrið er langt síðani givið við at bera nýggj sjónarmið fram, tíansheldur nýggjar upplýsingar. Tvørtur ímóti júkar man uppísaman aftur, endurtekur, trúttar niður í fólk. Landsstýrið er langt síðani farið frá at upplýsa og til at agitera, at royna at umvenda tað mótvilliga fólkið, um at tað sum landsstýrið ætlar, er tað einasta rætta, og alt hitt er ábyrgdarleyst.

Fyri tað fjórða so "kunnar" landsstýrið á ein slíkan hátt, at ávísir partar av tí kanningararbeiðinum, sum er gjørt, verða tagdir burtur. Hvør minist t.d., at í samband við sonevndu búskaparfrágreiðingina var eisini gjørd ein kanning av, hvussu privatu húsarhaldini og vælferðin hjá fólkinum var ávirkað, um ríkisveitingin varð tikin burtur í einum. Hetta verður jú støðan við eina loysing við eina skiftistíð uppá bert 4 ár. Hesi sonevndu "íslendsku tølini" umrøddu týðandi tættir sum t. d. "Vælferð og kappingarføri", "Skattatrýst" og "Arbeiði og vælferð". Við øllum teim fyrivarnum, sum vóru gjørd, vísti henda kanningin um "langtíðarárin av at ríkisveitingin fellur burtur", at t.d. húsarhaldsnýtslan fellur 24%, skattatrýstið økist 23-27% og "samanlagd mist vælferð" verður 17%. Nei, henda partin av búskaparfrágreiðingini dámdi landsstýrinum ongantíð, og tað er sjón fyri søgn, at í nýggja propagandafaldaranum frá landsstýrinum verður onki grett um hesi viðurskiftini. Tó kunnu tey, sum hava teldusamband heima, og duga og tíma at leita væl og longi millum annað líkt og ólíkt á fullveldisheimasíðuni hjá landsstýrinum, finna hesi "íslendsku tølini" undir "Tak niður". Tað er aktuellur lesnaður.

Sjálvstýrismálið er kanska tað týdningarmesta málið nakrantíð at taka støðu til og fremja á ein hátt so tað verður øllum fólkinum at gagni. Tí er so umráðandi at kunningin verður meira álítandi enn higartil, og at henda kanningin virðir tann veruleikan, at tað eru fleiri leiðir "frá heimastýri til fullveldi" enn tann eina, sum landsstýrið ber út.

Hans Pauli Strøm,
javnaðartingmaður

Oljufeløg vilja byggja íbúðir

Jan Müller

Tórshavnar Kommuna hevur fingið fyrispurning frá einum av oljufelagunum, sum ætlar sær at vera við í oljuleitingini við Føroyar, um at fáa lendi at byggja skrivstovubygning og íbúðir á. Hetta upplýsir Leivur Hansen, býráðsformaður, sum sær fyri sær einki minni enn eina sanna innrás av oljufólki, nú tá leitingin eftir olju og gassi á føroyska landgrunninum byrjar av álvara.

-Eg fari at kunna býráðið um fyrispurningin og annars at taka spurningum um komandi oljuvirksemið í býnum upp sigur Leivur Hansen, sum heldur, at nógv bendir á, at oljufeløg í stóran mun eru áhugað í at etablera seg í høvuðsstaðnum. Fleiri teirra hava longu latið upp skrivstovur her, og aðrar lata upp í næstum. Tað er greitt, at tørvur verður á íbúðum til oljufólkini og sær býráðsformaðurin í Havn hetta sum ein trupulleika, nú tað longu frammanundan er sera torført at fáa tak yvir høvdið í Havnini.

-Vit mugu til at fyrireika okkum so ella so uppá eitt slag av innrás av oljufólki, tá oljan sprænir viðgongur býráðsformaðurin, men hann hevur ikki í løtuni nakra ætlan ella loysn at vísa á. Tað er so nakað, sum má takast upp skjótt.

Tað er so heldur einki dulsmál, at Tórshavnar Kommuna við at lata økið á Sundi til komandi oljuútgerðarhavn eisini er tvingað at taka støðu til eitt nú íbúðarspurningin. Tí metir Leivur Hansen eisini, at hetta er nakað, sum má takast við í framtíðar tilrættaleggingina.

(í týsdagsblaðnum hava vit samrøðu við Leiv Hansen, borgarstjóra í Havn, sum herfyri var á oljumessu í Houston)

Lesið eisini Sosialin á Internetinum

www.sosialurin.fo

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæra mamma, vermamma og omma

JENNY SIGNHILD HANSEN
vanliga nevnd Jenny í Barnagarðinum, Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum tann 11. mai, 71 ár.

Kistan fer úr Kapellinum leygardagin 13. mai kl. 17.00. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni sunnudagin 14. mai kl. 14.

Fyri tey avvarðandi

Arnfinn, Solveig, Niels og Jørghild

Postfelagið ímóti privatisering

Tað er best fyri starvsfólkini, at Postverk Føroya verður verðandi eitt alment felag, heldur Postfelag Føroya

Eyðun Klakstein

Postfelag Føroya heldur, at Postverkið skal halda fram sum eitt alment felag og ikki sum eitt privat ella alment partafelag.

Hetta sigur formaðurin í Postfelagnum, Sunnleif Højgaard, nú tað er komið fram, at Postverkið hevur álvarsamar fíggjarligar trupulleikar.

Rakstrarúrslitið hjá Postverkinum fyrstu fýra mánaðirnar í ár var hálva triðju millión verri enn somu tíð í fjør.

Fær Postverkið ikki eina innspræning frá landskassanum, koyrir tað fast innan nakrar mánaðir, og so má tað steingja.

Vil hava nýggjan bygnað

Finnborgi Arge, landsstýrismaður, vil ikki biðja løgtingið um eykajáttan fyrr enn hann er vísur í, at bygnaðurin fyri Postverkið verður broyttur.

Samgongan er ósamd um, hvussu bygnaðurin hjá Postverkinum skal vera, men átrokandi penganeyðin fer at noyða landsstýrið at finna eina loysn.

Mánadagin verður landsstýrisfundur um málið, men Finnbogi Arge væntar ikki, at nøkur loysn verður funnin í bræði. Hann roknar við, at tað verður neyðugt at kalla tingið saman í summarfrítíðini fyri at viðgera støðuna hjá Postverkinum.

Tjóðveldisflokkurin hevur áður sett seg ímóti eini privatisering av Postverkinum, og tað er framvegis ikki sannlíkt, at hendan samgongan fer at privatisera Postverkið.

Hinvegin liggur ein loysn vi einum almennum partafelag nakað nærri.

Best fyri starvsfólkini

Sunnleif Højgaard, formaður fyri Postfelagið, heldur, at tað er best fyri starvsfólkini, um Postverkið verður verðandi eitt alment felag.

– Eingin skal rokna við, at pengar fara at streyma inn, bara tí Postverkið verður eitt partafelag, sigur hann.

– Eg haldi, at vit skulu viðurkenna, at postflutningur er ein partur av samfelagnum, og tí má tað almenna verða við til at gjalda fyri tað. Tað eigur ikki at vera ein treyt, at Postverkið skal geva yvirskot.

Hann heldur, at ein møguleiki er at umskipa Postverkið til at vera ein almenn fyritøka við nevnd, men enn hevur Postfelagið ikki viðgjørt støðuna á postøkinum.

Mánadagin ælta tey at halda nevndarfund, men Sunnleif Højgaard sigur, at tað er politiski myndugleikin, sum skal avgera, hvussu Postverkið skal skipast, men Postfelagið hevur sjálvandi sína hugsan um hetta.

Nýtt norskt føroyskt oljusamstarv

P/F Sjóborg í Leirvík, og norka felagið Havila Supply skrivaðu hósdagin undir samstarvsavtalu. Nýggja felagið hevur fingið navnið Havborg Supply Service. Fyrsti supply skipið hjá felagnum kemur ætlandi undir føroyskt flagg í næstum.

Fróði Løkságarð

Stendur tað til Osmund Justinussen reiðara, og Per Sævik stjóra í Havila Supply, verður nýggja føroysk norska felagið Havborg Supply Service ein náttúrligur partur av einari møguligari komandi føroyskari oljuvinnu. Nýggja felagið fer at bjóða út tænastur innan frálanda vinnuna við sonvendum supply skipum.

Við bústaði í Leirvík fer nýggja felagið at bjóða seg fram til kundar kring allan knøttin. At byrja við verður bara talan um tað eina skipið. Eftir hvat skilst so verður tað helst Havila Lista sum í fyrstu atløgu verður knýtt at nýstovnaða felagnum. Havila Lista er eitt av teimum nýggjastu skipunum í flotanum hjá Havila Supply. Skipið er 84 metrar langt, og smáar 19 metrar breitt. Skipið hevur eina høvuðsmaskinu uppá 9.600 hestar, og er annars útgjørt soleiðis, at tað far arbeitt allastaðni í heiminum, og líkur øll trygdarkrøv sum oljufeløgini seta.

Bara Føroysk manning Havila Supply, sum er norski parturin av samtakinum, hevur drúgvar royndir við skipum av hesum slag. Felagið eigur 30 skip sum sigla ymsa staðni kring jørðina, men tó er strørsti parturin av hesum skipum at finna í Norðsjógvnum. Tað eru 308 sjómenn knýttir at hesum norska reiðarínum, harav eru einir 12 — 14 føroyingar.

Havila Lista sum kemur undir føroyskt flagg skal bara vera mannað við føroyingum. At byrja við verður tó roknað við at einir tveir norðmenn vera við skipinum.

Havborg Supply Service chartrar norska skipið at byrja við. Skuldi eitt skip av slíkum slag verið keypt higar, hevði talan verið um eina rættuliga stóra fløgu. Skip av hesum slagnum verða bygd fyri millum 150 og 200 milliónir.

Fyrstu tíðina, eftir at nýggja felagið hevur yvirtikið skipið, fer Havila Lista at sigla fyri norska oljufelagið Statoil, sum samstarvar við Havila Supply. Havila hevur ein tvey ára sáttmála við Statoil um leigu av Havila Lista. Hetta leigumál fellur nú til nýggja felagið. Av tí sama var eisini eitt umboð fyri Statoil við á tíðindafundinum, og greiddi hann frá um tey krøv sum Statoil setur til sínar tænastuveitarar á hesum økinum.

Gamlir kenningar

Tað er ikki bara av tilvild at tað skuldi blíva til samstarv millum feløgini hjá Osmund Justinussen og Per Sævik.Teir báðir kennast frá fyrr av, men tó ikki í samband við oljuvinnu. Báðir hava teir verið formenn í ávíkavist tí føroyska og norska reiðarafelagnum.

Tá Havila Supply fekk hug at vera við í einari møguligari føroyskari oljuvinnu, var samband tikið upp við Osmund Justinussen og P/F Sjóborg, og skjótt var greitt at báðir partar vóru áhugaðir í einum samstarvi. Per Sævik stjóri í norska Havila Supply segði seg vera sera væl nøgdan við sínar nýggju føroysku samstarvsfelagaðar. Uttan hjálp frá útlendingum, hevði tað verið rættuliga trupult at fingið eitt sovorið føroyskt felag upp á føtur. Íløgurnar høvdu verið so mikið stórar, at ilt hevði verið at fingið tann neyðuga eginpeningin á borðið. Stjóri í Havborg Supply Service er Tummas Justinussen.

Stendur tað til Osmund Justinussen reiðara, og Per Sævik stjóra í Havila Supply, verður nýggja føroysk norska felagið Havborg Supply Service ein náttúrligur partur av einari møguligari komandi føroyskari oljuvinnu

Bilpakkar 2000 sumarið
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00

4 fólk í bíli

Danmark

Ferðist bíliga,
Tórshavn-Hanstholm
ella hinvegin
Fráf. Tórshavn: 19/5, 26/5, 2/6, 9/6, 1/9, 8/9
Fráf. Hanstholm: 13/5, 20/5, 27/5, 3/6, 10/6, 17/6, 19/8, 26/8, 2/9
úr 775,- fyri hvønn

Noreg

Ferðist bíliga,
Tórshavn-Bergen
ella hinvegin
úr 480,- fyri hvønn

Hetland

Ferðist bíliga,
Tórshavn-Lerwick
ella hinvegin
úr 385,- fyri hvønn

Ísland

Ferðist bíliga,
Tórshavn-Seyðisfjørður
ella hinvegin
Fráf. Tórshavn: 17/5, 24/5, 31/5, 7/6, 14/6, 21/6, 9/8, 16/8, 23/8, 30/8
Fráf. Seyðisfjørður: 25/5, 1/6, 8/6, 15/6, 22/6, 24/8, 31/8, 7/9
úr 728,- fyri hvønn

Skotland

Ferðist bíliga,
Tórshavn-Hetland-Skotland
ella hinvegin
úr 1.273,- fyri hvønn

e-mail: booking@smyril-line.fo